## Russar sett fleiri lond á svartalista

Tað eru sanniliga ikki bara føroysk virkir, sum russiska matvørueftirlitið heldur eygað við. Nú hava russisku myndugleikarnir boðað íslendingum frá, at tær 41 íslendsku fyritøkurnar, sum hava havt útflutningsloyvi til Russlands, eru settar á svartalista og hava mist loyvið. Somu boð hava útflutningsfyritøkur í Argentina, Kili, Peru, Uruguay og Kasakstan fingið. Samstundis hava fyritøkur í Avstralia, Týsklandi, Grikkalandi, Kanada, Indonesia, Niðurlondum, Portugal, Fraklandi, Japan og Svøríki fingið boð um, at tær eru góðkendar sum útflytarar. Í Danmark hava allar fyritøkurnar við undantak av trimum fingið góðkenning, skrivar NTB.




# Ábøtur meira átrokandi enn nakrantíð

**Atlantsflog kann liva við, at ongar ábøtur verða gjørdar í Vága Floghavn - men tað kunna Føroyar og føroyingar ikki, ljóðar tað frá stjóranum Magna Arge**

FLOGVØLLUR
*Edmund Jacobsen*




*Tað er torført hjá Atlantsflog at leggja ætlanir fyri framtíðina undir núverandi umstøðum, har ið ongi útlit eru til eina politiska semju um eitt betri føroyskt undirstøðukervi innan flogferðslu, heldur Magni Arge, stjóri í Atlantsflog*

Tað hevur alstóran týdning, at ábøtur sum skjótast verða gjørdar í Vága Floghavn. Annars er vandi fyri, at føroyingar gerast eftirbátar innan flogferðslu.

Soleiðis ljóða boðini frá Magna Arge, stjóra í Atlantsflog.

- Ongar ábøtur eru framdar á verandi undirstøðukervi til flúgving í eini 25 ár. Og kappingarførið viknar mótvegis øðrum tjóðum, sum støðugt hava gjørt íløgur í betri flogumstøður. Um vit ynskja at betra um regularitetin og at hækka trygdina, so hava vit ikki ráð til at bíða við ábótum. Hetta má og skal raðfestast ovast, sigur Magni Argi.

### Rímiligt ynski

Magni Arge hevur onga avgjørda meining, tá ið tað snýr seg um framhaldandi tjakið um nýggjan flogvøll, ella eina eyka lendingarbreyt í Klovanum, tætt við verandi floghavn. Hann vísir á, at sum felag fer Atlantsflog altíð at virka undir teimum umstøðum og fortreytum, sum nú einaferð eru galdandi.

- Hetta merkir sostatt eisini, at vit gott kunnu virka, hóast ongar ábøtur verða framdar í Vága Floghavn. Men eg haldi ikki, at tað er órímiligt at ynskja sær ábøtur á føroyska undirstøðukervi til flogferðslu, tá ið havt verður í huga, hvussu stórar íløgur eru framdar í føroyska ferðslukervi sum heild hesi seinastu 25 árini, sigur Magni Arge.

Hann hevur áður víst á, at bæði trygd og regularitetur kunnu hækkast við at fremja íløgur í betri innflúgvingartól, nýmótans ljós og eina longri lendingarbreyt. Hesar íløgur eiga at verða framdar sum skjótast, so til ber at nýta fleiri ymisk sløg av flogførum - tyngri sum lættari - og at hesi kunnu lenda undir torførari veðurlíkindum enn í dag.

### Skeivt at tengja saman

Magni Arge vísir eisini á, at jú støðugari arbeiðstreytir Atlantsflog hevur, tess lættari er tað hjá felagnum at gera álítandi framskrivingar, og síðani at fremja íløgur í tráð við hesar.

- Eg má bara vóna, at avgerðin um at leingja flogvøllin í Vágum stendur við, so vit kunnu koma víðari innan lutfalsliga stutta tíð. At man seinni møguliga tekur avgerð um at gera eina størri floghavn, tað er fínasta slag. Men ábøtur á verandi undirstøðukervi, sum eftir mínum tykki eiga at verða gjørdar sum skjótast, mugu ikki verða tengdar at, hvørvítt vit í Føroyum skulu hava ein nýggjan flogvøll ella ei, heldur Magni Arge.

Hann vísir á, at íløgur innan undirstøðukervi til flogferðslu sum oftast verða avskrivaðar yvir eitt langt áramál - kanska eini 50 ár - og at føroyingar fáa stórt gagn av verandi flogvølli, um ein nýggjur flogvøllur verður lagdur soleiðis, at veðurumstøðurnar kompensera hvønn annan..

- Sum felag fer Atlantsflog framhaldandi at virka undir teimum umstøðum, sum nú einaferð eru galdandi. Men sum føroyingur hevði eg ynskt, at viðurskiftini vóru betri, sigur Magni Arge.


Eitt lítið KT-virki
er blivið 1 ár



Vit hava loyst uppgávur innan Microsoft SharePoint fyri smáar kundar við 10 starvsfólkum og fyri stórar kundar við 1.6 mió brúkarum á teirra ekstraneti.

Hava eisini verið ráðgevar og undirveitarar í sambandi við verkætlanir á 1.3 mia krónur.

Stutt sagt, so elska vit at loysa uppgávur í SharePoint!

intra
intra@intra.fo
+298 599 123

SKRÁSETTUR MICROSOFT PARTNARI

Grafikmaster tel 227000

**Intra** er leiðandi innan Microsoft SharePoint við kundum á privata og almenna økinum, bæði í Føroyum og í Danmark. Vit hava hollar royndir innan Microsoft, .NET, SharePoint og Office 2007.